LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 25. september 2014
J.Nr.: LUM-29- 14/00048-1
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**
viðvíkjandi klagu um talgildar lønarseðlar

Við teldubrævi 27. februar 2014 hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Gjaldstovan boðar nú frá, at lønarseðlar eftir 1. mars 2014 einans verða sendir í Mínboks.
>
> Mín spurningur er, hvørja heimild Gjaldstovan hevur at krevja av okkum, at vit skulu hava Mínboks.
>
> Kemur mær til hugs málið um Mínboks og Studni, har kravt varð, at næmingar, sum søktu um stuðul, skuldu hava Mínboks. Niðurstøðan var, at Studni kundi ikki krevja, at fólk skulu hava Mínboks."

Saman við klaguni varð sent soljóðandi teldubræv frá Gjaldstovuni:

> "Frá 1. mars 2014 sendir Gjaldstovan einans lønarseðlar í Mínboks
>
> Tíðliga í 2013 boðaði Gjaldstovan frá, at Mínboks fór at loysa av Netmiðluna. Tað verður gjørt nú. Frá 1. mars verða lønarseðlar bara sendir í talgilda postkassan Mínboks og Netmiðlan verður løgd niður.
>
> Innritað verður á www.minboks.fo og har sær starvsfólkið sínar lønarseðlar. Hevur starvsfólk ikki Mínboks, verður eisini meldað til har.
>
> Síðani í 2005 hevur Gjaldstovan sent lønarseðlar talgilt í Netmiðluna. Teir lønarseðlarnir eru nú allir fluttir í Mínboks í serskilda mappu, sum eitur "Gamlir lønarseðlar".
>
> Úr netmiðluni ber til at senda lønarseðlar víðari við telduposti. Tað verður ikki gjørt longur, tí Mínboks sendir ikki brúkaranum skjøl við telduposti.

Traðagøtu 43 · Postrúm 2008 · FO-165 Argir · Tlf 358500 · Faks 358501 · lum@lum.fo · www.lum.fo

Mínboks er ókeypis at stovna og nýta, og netbanki er ikki longur treyt fyri atgongd."

## Málsgongd

Víst verður til frágreiðingina hjá Gjaldstovuni undir partshoyringini.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 27. februar 2014, varð klagan send Gjaldstovuni til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Gjaldstovan varð m.a. biðin um at greiða umboðsmanninum nærri frá heimildini fyri einans at senda lønarseðilin í talgildan postkassa, og um starvsfólk, sum ikki hava Mínboks, hava møguleika at fáa lønarseðilin á annan hátt.

Tann 20. mars 2014 sendi Gjaldstovan umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"**Svar til skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni um klagu frá A, dagfest 27.02.14**

Løgtingsins Umboðsmaður hevur í skrivi dagfest 27. februar í 2014 sent Gjaldstovuni klagu frá A, um at Gjaldstovan frá 1. mars í 2014 einans sendir alment settum starvsfólkum lønarseðilin í talgilda postkassan Mínboks.

Gjaldstovan er biðin at greiða gjøllari frá hesum trimum spurningunum:

- heimildini fyri einans at senda lønarseðilin í talgildan postkassa
- um starvsfólk, sum ikki hava Mínboks, hava møguleika at fáa lønarseðilin á annan hátt
- um Gjaldstovan hevur kunnað starvsfólk um henda møguleikan.

Svarini eru í stuttum:

- Í umleið helvtini av almennu sáttmálunum er avtalað, at starvsfólk skal hava útgreinaðan lønarseðil ella seðil, har tilskilað er, hvat lønin er fyri. Í fleiri sáttmálum, m.a. tí hjá Starvsmannafelagnum, stendur einki um lønarseðil.
- Í skattalógini § 63, stk. 7 stendur, at løntakari skal hava skrivliga fráboðan, tá ið løn verður ávíst.
- Ásett er ikki, at lønarseðilin skal vera pappír. Í roknskaparkunngerðini er ásett, at roknskaparverkið skal virka talgilt við so lítlari tilfeingisnýtslu sum til ber.
- Nei, annar møguleiki er ikki at vísa á.
- Tí er heldur ikki annar møguleiki at kunna um.

Niðanfyri er nágreiniligari greitt frá.

**Søguliga**

Felags lønarskipan fyri tað almenna var gjørd í 2002 og Gjaldstovan umsitur hana. Tá vóru áleið 50 lønarskipanir í tí almenna, og so at siga allar hesar lønir verða nú avgreiddar um felags lønarskipanina. Eisini lønirnar hjá B, har kærarin er í starvi.

Lønarskipanirnar vóru ymiskar, lønir vórðu umsitnar ymiskt og tað vórðu lønarseðlarnir eisini. Onkrir stovnar sendu lønarseðlar við posti, aðrir lótu leiðandi starvsfólk bera starvsfólkunum teir, og á onkrum stovnum komu starvsfólkini á lønarskrivstovuna eftir lønarseðlunum. Eisini hevur onkur stovnur sent lønarseðlarnar við telduposti.

Gjaldstovan roknaði einaferð, hvussu nógv tíð skal til at avgreiða lønarseðlar handaliga, soleiðis sum greitt er frá omanfyri, og hvussu nógv tað kostar. Vit fingu kostnaðin at liggja millum 15 kr. og 50 kr. fyri hvønn lønarseðil. Tað eru nøkur ár síðani, so kostnaðurin er hægri í dag. Í dag senda vit umleið 10 túsund lønarseðlar um mánaðin, t.e. 120 túsund um árið. Skuldu teir verið sendir sum fyrr í tíðini, hevði tað kostað væl oman fyri milliónina, kanska fleiri milliónir. Har var, og er, eyðsæð nógvur peningur at spara.

Longu í 2005 fór Gjaldstovan at senda lønarseðlar talgilt. Tað var liður í at talgilda almennu fyrisitingina, við tí endamáli at gera hana munadyggari, fáa meiri fyri minni og fyri at veita borgarunum betri tænastu. Hetta var eitt av fleiri átøkum á talgildingarleið. Annað, sum var gjørt talgilt, var roknskaparútskriftir, inntøppingarmyndir, og skipanir vóru eisini knýttar tættari saman.

Tann broytingin, sum stendst av, at lønarseðilin nú verður sendur í Mínboks í staðin fyri í Netmiðluna, er í høvuðsheitum, at nú er lønarseðilin tøkur í øðrum talgildum postkassa, enn hann var fyrr. Í postkassa, sum væl fleiri veitarar senda til, og har skjølini eisini eru lættari at handfara, finna og hyggja í, enn tey hava verið.

At lønarseðlar verða sendir talgilt er søguligt. Tað hevur verið gjørt seinastu níggju árini.

**Krav um at talgilda**
Í 2007 varð formliga kravt, at roknskaparverkið skuldi talgildast. Í § 3 í roknskaparkunngerðini stendur:

*Roknskaparverkið skal mest møguligt virka talgilt við so lítlari tilfeingisnýtslu sum møguligt og verða so sjálvvirkandi, sum til ber. Fíggjarmálaráðið er samskipandi liður á økinum.*

Tað er avleiðing av hesi ásetingini, at m.a. lønarseðlarnir eru talgildaðir.

**Hvat er Mínboks**
Mínboks er persónligur talgildur postkassi, har einstaki borgarin hevur atgongd til sín og bara sín post. Brøvini eru óbroytilig og liggja í tryggum rakstrarumhvørvi. Verður lønarseðilin í staðin sendur á t.d. hotmail- ella yahoo-adressu ella, sum A hevur biðið um, í talgilda postkassan hjá arbeiðsstaðnum, er tað væl ótryggari og tryggjar heldur ikki, at lønarseðlarnir eru tøkir og goymdir á tryggum staði fyri lívið.

Síðani loysnin við at rita seg inn við Mínlykil er ment, sum er eitt framúrskarandi amboð, er loysnin eisini trygg. Hon er ókeypis og ikki bundin at øðrum skipanum, sum galdandi var í fyrstani, tá ið netbankaatgongd var einasti møguleiki.

Gjaldstovan sendir allar lønarseðlar í Mínboks. Tá ið starvsfólk fyrstu ferð fær løn umvegis Gjaldstovuna, verður Mínboks postkassi sjálvvirkandi stovnaður fyri starvsfólkið. Tá ið starvsfólk so meldar seg til Mínboks, liggja gamlir lønarseðlar tí eisini har.

Tá ið Umboðsmaðurin spyr, um starvsfólk, sum ikki hava Mínboks, hava møguleika at fáa lønarseðilin á annan hátt, er ógreitt, hvat meint verður við. Tað er ikki avmarkað, hvør kann hava Mínboks. Einasta fortreytin er atgongd til teldu og alnótarsamband.

**Trygt, skjótt og gott**
At senda lønarseðlar talgilt er væl tryggari, enn at senda teir við posti. Tá ið vit sendu við posti, gekk mangan striltið at fáa brøvini í rættar hendur. Bústaðurin í bústaðarskránni var ikki rættur, navnið stóð ikki á postkassanum, brævið fór í skeivan postkassa o.l. Eisini tók tað so mikið nógvar dagar at bera postin út, tí Gjaldstovan sendi altíð postin sum B- post, at fleiri ringdu at spyrja útgreinandi um lønina, tey høvdu fingið.

Tá ið allir lønarseðlarnir vórðu sendir við posti, tók tað fleiri dagar at avgreiða teir av lønarskrivstovuni: at skriva út, skera, bunda og bera á posthúsið.

At lønarseðilin verður sendur talgilt merkir, at hann verður sendur um somu tíð, sum løn verður goldin út, lønarseðilin kemur í rættar hendur beinanvegin, er altíð tøkur, er lættur at fáa hendur á, tí hann liggur á alnótini og hann er lættur at finna aftur. Borið saman við at senda við posti, er tað økt tænasta og betri trygd.

Starvsfólkið fær fatur á lønarseðlinum, sama ger um tað flytur, skiftir starv ella fær sær nýggja teldupostadressu. Eisini fæst fatur á lønarseðlunum frá øllum teldum, eru trygdarkrøvini hildin.

At tað eisini er umhvørvisvinaligari at senda talgild, er ein eyka ágóði.

At bjóða starvsfólkum at senda lønarseðilin í teldupostí, er tíverri ikki haldgóð loysn. Sambært Persónsdátulógini er ikki loyvt at senda trúnaðarupplýsingar um opnu alnótina. Hava vit sum myndugleiki bara ta loysnina at vísa á, mugu vit senda lønarseðlarnar brongladar. Tað krevur loysnir, sum vit ikki hava í Føroyum.

Nakað annað er eisini, at tað verður ógvuliga trupult at umsita tað, at senda við teldupostí. Nógvar teldupostadressur skulu tá skrásetast hvønn mánað. Tær skulu skrásetast við hond, so feilkeldurnar eru nógvar. Tann, sum skrivar ella ringir við boðunum, kann siga skeivan bústað. Tann, sum skrásetur, kann skráseta skeivt. Tað kann ikki verða tryggjað, at tað er rætti persónurin, sum vendir sær til lønarskrivstovuna. A hevur sjálv biðið um at fáa arbeiðsteldupostin skrásettan. Fer hon úr starvi, men framvegis fær løn, er ógreitt hvar seðilin so skal verða sendur.

Fyri fleiri túsund starvsfólk verður tað ikki bara tíðarkrevjandi, kostnaðarmikið og skeivu megin lógina, men lættliga eitt satt sirkus.

**Skynsamt og munadygt**
Almennur arbeiðsgevari skal umsita sína játtan munadygt, og at lønarseðil verður sendur talgilt, er væl bíligari enn at senda hann við posti. Gjaldstovan hevur eisini skyldu at arbeiða skynsamt, munadygt og populert sagt fáa meiri fyri minni. At lønarseðlar verða sendir talgilt, hevur spart stovnunum nógvan pening. Í 2005, tá ið vit fóru undir at senda lønarseðlar talgilt, fór útreiðslan niður í helvt. Postgjaldið er hækkað hesi níggju árini, men gjaldið at senda talgilt hevur staðið í stað og fer at lækka næstu tíðina.

> Sum víst á fyrst í svarinum, er í umleið helvtini av sáttmálunum ásett, at arbeiðsgevari skal senda lønarseðil, tá ið løn verður goldin, og líknandi áseting er í skattalógini. Hvørgastaðni er ásett, at tað skal vera pappír.
>
> At starvsfólk skulu kunna velja millum fleiri møguleikar, t.d. sum pappírspost, teldupost ella í talgildan postkassa, verður tíðarkrevjandi, kostnaðarmikið og ógjørligt at umsita. Tá verður kanska einasta loysnin at senda við pappírsposti, umvegis Posta.
>
> Umleið 10 túsund fólk hava fingið sær Mínboks og okkara fatan er, at fólk eru væl nøgd.
>
> Telda og alnótarsamband eru fortreyt fyri at hava Mínboks. Flestu fólk í Føroyum hava tað í dag. Tað sæst m.a. í, hvussu virki og stovnar samskifta við síni viðskiftafólk. Eisini B hevur lagt á tann bógvin. ...
>
> **Kæran og niðurstøðan um Studna**
> Í skrivinum frá Umboðsmanninum er avrit av klagu um talgildar umsóknir um lestrarstuðul. Mínboks er ikki, sum í døminum við Studna, fortreyt fyri at starvsfólk fær løn, men fortreyt fyri at starvsfólk fær fráboðan um, hvat tað hevur fingið í løn. Samskiftið um lønarumbønir, so sum at seta fólk í starv, broyta starvstíð ella steðga løn, er millum stovnsleiðara og Gjaldstovuna og er als ikki umvegis Mínboks.
>
> **Avbjóðingar**
> Størsti trupulleikin at hava talgilt samskifti í Føroyum, er at dátunøgdirnar eru so fáar. At spjaða á fleiri loysnir, er tí ein stór hóttan, tá ið talan er um at talgilda og effektivisera. Verða vit 'noydd' at senda bæði sum talgilt og pappír, er tað at víðka tænastuna og at áleggja okkum stóra meirútreiðslu, sum krevur niðurlagingar á øðrum økjum.
>
> Tað kann ikki vera meiningin, at vit skulu fara aftur til tað, sum vit fóru frá fyrst í hesi øldini. At almenn játtan skal verða brúkt til pappír, brævbjálvar og frímerki, heldur enn at laga okkum eftir tíðini í dag og áhaldandi at gera almennu umsitingina skynsamari og munadyggari."

Við skrivi, dagfest 24. mars 2014, vórðu viðmerkingarnar hjá Gjaldstovuni sendar klagaranum til ummælis, sum tann 2. apríl 2014 sendi umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "Takk fyri, at tit hava tikið málið upp.
>
> Men onkursvegna er misskiljing komin í. Eg havi nevniliga ikki biðið um at fáa lønarseðil sendandi á pappíri, sum D annars hevur gjørt nógv burturúr at greiða frá, hvussu trupult tað er, nú vit øll eru so talgild.
>
> Mín spurningur er einfaldur: Hvørja heimild hevur Gjaldstovan at krevja, at eg skal hava Mínboks, tí annars fái eg ikki lønarseðil ?
>
> Tað er spurningurin."

Við skrivi, dagfest 7. apríl 2014, heitti umboðsmaðurin á Fíggjarmálaráðið um at gera sínar viðmerkingar til spurningarnar frá umboðsmanninum til Gjaldstovuna í skrivinum frá 27. februar 2014 við einari freist áljóðandi 4 vikur. Eftir umbøn frá Fíggjarmálaráðnum varð freistin longd til 15. mai 2014.

Tann 9. mai 2014 sendi Fíggjarmálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "**Viðmerkingar til kæru frá A um Mínboks**
>
> Kæran snýr seg um, hvørja heimild Gjaldstovan hevur at krevja, at lønmóttakarar skulu hava Mínboks.
>
> Fíggjarmálaráðið hevur soljóðandi viðmerkingar til kæruna.
>
> Í skattalógini § 63, stk. 7, er ásett, at løntakari skal hava skrivliga fráboðan, tá ið løn verður ávíst. Í nøkrum sáttmálum á almenna arbeiðsmarknaðinum er eisini ásett, at starvsfólk skulu hava útgreinaðan lønarseðil ella seðil, har tilskilað er, hvat lønin er fyri.
>
> Til spurningin, hvørt Gjaldstovan heldur ásetingarnar í skattalóg og sáttmálum um at senda út skrivliga fráboðan til lønmóttakaran í sambandi við lønarútgjalding, er at siga, at tað ikki er ásett við lóg, at lønarseðilin skal sendast talgildur umvegis Mínboks. Harafturímóti er ongastaðni ásett í galdandi lóg ella sáttmálum, hvussu lønmóttakarin skal hava skrivligu fráboðanina ella seðilin, har tilskilað er, hvat lønin er fyri.
>
> Gjaldstovan hevur áður sent talgildu lønarseðlarnar út umvegis Netmiðluna, men tíðliga í ár boðaði Gjaldstovan lønmóttakarunum frá, at Netmiðlan fór at verða niðurløgd, og frá 1. mars í ár fór Gjaldstovan tí at senda talgildi lønarseðlarnar út umvegis Mínboks, ið er ein talgildur postkassi, sum allir borgarar í landinum kunnu fáa ókeypis atgongd til.
>
> Gjaldstovan hevur í sínum viðmerkingum til kæruna ítøkiliga greitt frá, hví Gjaldstovan hevur tikið avgerð um at senda talgildu lønarseðlarnar út umvegis Mínboks. Gjaldstovan hevur valt Mínboks, tí tey eru komin til ta niðurstøðu, at hetta er skynsamasti og tryggasti hátturin at senda út talgildar lønarseðlar, og allir løntakarar kunnu ókeypis fáa atgongd til sín lønarseðil umvegis Mínboks."

Tann 27. mai 2014 boðaði umboðsmaðurin klagaranum, Gjaldstovuni og Fíggjarmálaráðnum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Niðurstøða**

Hendan klagan snýr seg um, hvørja heimild Gjaldstovan hevur til bara at senda lønarseðlar í Mínboks.

Eg fari fyrst at viðgera, um skattalógin heimilar, at lønarseðlar verða sendir talgilt. Í øðrum lagi fari eg at viðgera, um ein almennur myndugleiki kann krevja, at borgarin samskiftir talgilt. At enda fari eg at viðmerkja einstakar tættir í mannagongdini, sum Gjaldstovan setti í verk 1. mars 2014, um bara at senda lønarseðlarnar í Mínboks.

*Skrivlig fráboðan sambært § 63, stk. 7 í skattalógini*

Sambært § 63, stk. 7 í skattalógini (Løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum m.a. broytt við løgtingslóg nr. 43 frá 15. apríl 1992) hevur arbeiðsgevari skyldu til at lata starvsfólki skrivligar lønarseðlar.

Ásetingin er soljóðandi:

> "Hin ávísingarskyldugi skal í sambandi við hvørja ávísan av A-inntøku, lata løntakaranum skrivliga fráboðan, ið sigur frá navni, bústaði og arbeiðsgevaratali hjá ávísingarskylduga, og navni og persónstali hjá løntakara, lønarskeiði, A-inntøku, mótkrøvum og ikki skattskyldugum veitingum."

Gjaldstovan hevur víst á, at tað er ikki ásett, at lønarseðilin skal vera á pappíri. Spurningurin er tískil, um kravið um, at lønarseðilin skal vera skrivligur, hevur við sær, at lønarseðilin einans kann og skal latast á pappíri, ella um kravið kann verða lokið við eisini at senda lønarseðilin talgilt. Svarið valdast eina tulking av ítøkiligu ásetingini.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið sæst, at endamálið við neyvu útgreiningini av lønarseðlinum er at geva løntakaranum betri møguleika at halda greiði á, hvat verður trekt av hvørjari einstakari lønarflyting til skatt, ymisk gjøld, frítíðarløn o.s.fr. (Løgtingstíðindi, 101/1991, bls. 500). Út frá hesum kann grundgevast fyri, at skrivligi lønarseðilin fyrst og fremst er ætlaður sum upplýsing og skjalprógvan av, hvat verður trekt í skatti, og at tað sambært ásetingini tí ikki er eitt krav, at lønarseðilin skal vera á pappíri, um talgildi seðilin kann goymast. Hetta sama kann eisini sigast, um ásetingin verður tulkað við støði í menningini innan talgilt samskifti.

Hinvegin er í viðmerkingunum til ásetingina ikki tikin støða til, hvussu kravið um skrivliga fráboðan skal skiljast. Helst av teirri orsøk, at ásetingin er sett í lógina í 1992, og at spurningurin um talgilda fyrisiting um hetta mundið neyvan var viðkomandi. Aftrat hesum hevur borgari skyldu at rætta seg eftir lóggávuni, og heimildir myndugleikans mugu tí vera greiðar. Hetta talar ímóti eini víðkaðari tulking av ásetingini.

Samanfatandi haldi eg tað vera sera ivasamt, um § 63, stk. 7 í skattalógini heimilar, at lønarseðlar verða sendir talgilt, og hesin ivi eigur at verða greiddur við eini møguligari lógarbroyting. Eg skal samstundis viðmerkja, at tað er einki grundarlag fyri at tulka ásetingina á ein slíkan hátt, at talgilt verður sett í staðin fyri skrivligt.

*Krav um talgilt samskifti krevur serstaka heimild*
Í síni frágreiðing til mín um ítøkiligu klaguna viðmerkir Fíggjarmálaráðið, at tað ongastaðni er ásett, hvussu lønmóttakarin skal hava skrivliga lønarseðilin. Eg lesi hetta sum, at Fíggjarmálaráðið er av teirri fatan, at heimild er fyri nýggju mannagongdini, sum hevur við sær, at løntakari skal melda seg til Mínboks fyri at móttaka lønarseðilin. Hesi fatan er ikki grundarlag fyri.

Ein myndugleiki kann ikki uttan serstaka lógarheimild krevja, at ein borgari skal senda myndugleikanum skrivligt samskifti í talgildum formi, ella krevja, at borgarin skal móttaka brøv o.a. í talgildum formi frá myndugleikanum.

Eg fari í hesum sambandi at vísa á viðgerð mína av hesum spurningi í skrivi, dagfest 3. februar 2014 til Studna um talgildar umsóknir um lestrarstuðul (j. nr. 201300055), har eg m.a. skrivaði soleiðis:

> "Tað er ongastaðni í lóggávuni generelt ásett, á hvønn hátt ein borgari kann ella skal venda sær til almennu fyrisitingina. Av tí at tað í lóggávuni ikki eru ásett serlig formkrøv, kann borgarin í útgangsstøðinum sjálvur gera av, á hvønn hátt hann vendir sær til fyrisitingina. Hetta er í fyrstu atløgu treytað av, at fyrisitingin tekniskt er før fyri at taka ímóti tí, sum sent verður. Í aðru atløgu kunnu tað í lóggávu vera ásett serlig formkrøv, sum t.d. brúk av serligum oyðubløðum og krøv um undirskrift, sum gera, at borgarin skal venda sær til fyrisitingina á ein ávísan hátt. Í aðramáta kann ein borgari venda sær til fyrisitingina í talgildum formi, velur hann tað.
>
> Ein myndugleiki hinvegin kann tó ikki uttan serstaka lógarheimild krevja, at skrivligt samskifti millum borgara og almenna myndugleikan skal vera talgilt. Ein myndugleiki kann ikki krevja, at ein borgari skal senda myndugleikanum skrivligt samskifti í talgildum formi, ella krevja, at borgarin skal móttaka brøv o.a. í talgildum formi frá myndugleikanum."

Sum stuðul fyri sínum sjónarmiði um einans at senda lønarseðilin talgilt vísir Gjaldstovan á, at tað í 2007 formliga varð kravt, at roknskaparverkið skuldi talgildast, tá tað í § 3, stk. 5 í roknskaparkunngerðini (kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.) varð ásett, at roknskaparverkið skuldi vera talgilt við so lítlari tilfeingisnýtslu sum til bar. Gjaldstovan vísir eisini á, at Gjaldstovan í 2005, sum lið í at talgilda almennu fyrisitingina, byrjaði at senda lønarseðlar talgilt í Netmiðluna, og at tað er søguligt at senda lønarseðlar talgilt.

Um hesi sjónarmið er at siga, at roknskaparkunngerðin regulerar, hvussu roknskaparverkið skal fyrisitast av myndugleikunum. Kunngerðin heimilar ikki, at skyldur verða álagdar borgarunum í samskiftinum við Gjaldstovuna. Eg eri varug við, at Gjaldstovan í 2005 byrjaði at senda lønarseðlar talgilt í Netmiðluna. Men eg kann samstundis bara staðfesta, at ongar broytingar eru gjørdar í skattalógini ella aðrari lóg av hesi orsøk.

Samanumtikið kann Gjaldstovan ikki uttan serstaka heimild krevja, at løntakari skrásetir seg í Mínboks fyri at móttaka lønarseðilin. Við nýggju mannagongdini lýkur Gjaldstovan tískil ikki kravið í § 63, stk. 7 í skattalógini um at lata starvsfólki skrivliga fráboðan um løn og skatt, tí hendan hevur við sær, at fleiri starvsfólk fáa ikki lønarseðilin og hava ikki møguleika at lesa hann.

*Viðmerkingar til mannagongdina, sum Gjaldstovan setti í verk 1. mars 2014*
Sambært Gjaldstovuni er broytingin í mun til undanfarnu mannagongd í høvuðsheitum, at lønarseðilin nú er tøkur í øðrum talgildum postkassa, enn hann var fyrr. Hetta er ikki heilt rætt.

Sum eg skilji brúkaratreytirnar fyri Mínboks (endurgivnar á www.minboks.fo, dagfestar 1. november 2012), kann ein brúkari av Mínboks ikki velja bert at móttaka post frá einum myndugleika og velja samskifti við aðrar myndugleikar og privat virki frá. Nýggja mannagongdin hevur tískil við sær eitt krav um, at øll alment sett starvsfólk uttan undantak mugu skráseta seg í Mínboks og móttaka post frá øllum myndugleikum og privatum virkjum, sum eru ella verða skrásett í Mínboks. Eitt slíkt krav krevur greiða lógarheimild.

Gjaldstovan hevur greitt mær frá, at skrásetir starvsfólkið seg ikki sjálvboðið í Mínboks, verður ein talgildur postkassi sjálvvirkandi stovnaður fyri starvsfólkið, fyrstu ferð tað fær løn umvegis Gjaldstovuna. Sambært brúkaratreytunum skal

Mínboks við stovnan hava persónstalið hjá brúkaranum. Mannagongdin reisir eftir mínum tykki spurningin um skráseting av persónstalinum uttan samtykki, og eisini spurningin um rættin til at uppsiga talgilda postkassan, og um rættin til at strika upplýsingar. Eg havi í hesum sambandi gjørt av at senda Dátueftirlitinum eitt eintak av hesum áliti við fyrispurningi um ein tílík mannagongd eftir teirra tykki krevur eina nærri viðgerð sambært persónsupplýsingarlógini.

Í síni frágreiðing vísir Gjaldstovan á fleiri orsøkir til at menna og broyta mannagongdir, og í høvuðsheitum tykist dentur verða lagdur á teknisk, fíggjarlig og fyrisitingarlig atlit. Tað sæst ikki, at nøkur løgfrøðilig meting ella viðgerð er farin fram í hesum sambandi.

Tað er ábyrgdin hjá almennum myndugleikum at tryggja, at stig, sum verða tikin í sambandi við talgilda fyrisiting, eru lóglig, og at talgildar skipanir gera tað møguligt hjá myndugleikunum at halda galdandi lógarkrøv. Eg fari tí at heita á Fíggjarmálaráðið, sum bæði er samskipandi liður í sambandi við talgilding av roknskaparverkinum og ovasti fyrisitingarligi myndugleiki á økinum, um at taka hetta mál til viðgerðar og lata meg frætta úrslitið av hesi viðgerð.

Vísandi til, at viðgerðin av hesi klaguni avdúkar ivaspurningar um galdandi lóggávu og, eins og málið um talgildar lestrarstuðulsumsóknir, varpar ljós á tørvin á yvirskipaðum lóggávutiltøkum í sambandi við talgilda fyrisiting, havi eg samsvarandi § 12 í umboðsmanslógini gjørt av at senda Løgtinginum og landsstýrismanninum í fíggjarmálum eitt eintak av hesum áliti.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður